gult12 cyan12 magenta12 svart12



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Ráðstevna um havið byrjar í Føroyum í dag

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

85 fólk, harav 50 útlendsk, íð øll hava servitan innan havumhvørvið og fiskivinnu sita í dag í Norðurlandahúsinum og tosað um vernd at havinum og burðardygga veiðu. Talan er um eitt stórt tiltak og spenningurin er eisini stórur um hvat fer at spyrjast burtur úr.

Fiskimálaráðharrar úr øllum strandalondunum kring Norðuratlantshav eru savnaðir í Norðurlandahúsinum, eisini fiskifrøðingar, umhvørvisfólk og umborð fyri vinnu.

– Spurningurin er um ein slík stevna fer at enda við, at øll vilja so gjarna, men gera onki við tað ella um nakað ítøkiligt fer at spyrjast burtur úr. Tað er ikki til at siga frammanundan. Men strandalondini hava júst havt ein fund í Góteborg um burðardygga veiðu í Norðuratlantshavi og tann fundurin var gevandi, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

– Tað, sum eg haldi er gott við stevnuni er, at nú kenna vit rættuliga at tað eru onnur lond enn vit í Norðurlondum, sum eisini liva av fiskivinnu. Eitt nú New Foundland og Hetland. Vit kunnu fáa eina fatan av hvat tað vil siga, tá fiskivinnan ikki verður stýrd lokalt. Eitt nú er stórur munur á hvat stjørnin í Ottawa heldur um fiskiveiðu samanborið við myndugleikarnar í Newfoundlandi. Í Óttawa eru teir nógv longri frá fiskivinnuni og hon er bara eitt av mongum beinum. Í Newfoundlandi er hon alt. Longur tú er burtur frá vinnuni, tess meiri langsiktað kann tú loyva tær at hugsa. Tað er tað sama sum í Føroyum. Tað er lætt hjá ICES at gera tilmæli, nakað heilt annað er hvussu tey kunnu førast út í lívið, soleiðis at vinnan eisini yvirlivir, sigur Jørgen Niclasen.

Tað verður løgmaður sum setir stevnuna. Hjástaddir vera varaløgmaður Høgni Hoydal og Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

Umframt eina rúgvu av fyrilestrum, so fáa luttakararnir eisini høvi at hugna sær. Fríggjadagin fáa luttakarar, sum hava hug, høvi til at at sigla vestur í Vágar á veg aftur heim.



Gólvsølan

32 bátar seldu knøpp 13 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum týsdagin

| Syslu-nummar | Skipanavn | reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| 000000 | Grønhólmur | lína | 68 |
| FD 363 | Líðarbrúgv | snella | 191 |
| FD 380 | Amanda | snella | 737 |
| FD 954 | Vørðan | snella | 357 |
| TG 14 | Heykur | lína | 319 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 90 |
| TG 185 | Egil | snella | 40 |
| TG 227 | Edvør | lína | 2.714 |
| TG 283 | Herdis | snella | 439 |
| TG 303 | Richard í smiðjuni | snella | 89 |
| TG 349 | Trý drangur | snella | 417 |
| TG 395 | Vima b | snella | 113 |
| TG 40 | Kambur | snella | 971 |
| TG 41 | Vesturskin | snella | 53 |
| TG 471 | Núpur | lína | 177 |
| TG 514 | Keldafossur | snella | 137 |
| TG 523 | Sóley | snella | 110 |
| TG 56 | Marian m. | snella | 760 |
| TG 562 | Todnes | snella | 78 |
| TG 592 | Jenny b | snella | 945 |
| TG 622 | Varðin | snella | 69 |
| TG 631 | Skarstein | snella | 656 |
| TG 670 | Víkaberg | snella | 1.212 |
| TG 731 | Annie m/b | snella | 105 |
| TG 797 | Norðfarið | lína | 219 |
| TG 95 | Fløtunes | snella | 111 |
| VA 105 | Barið | snella | 87 |
| VA 109 | Ella | lína | 478 |
| VA 284 | Biritu jóhannus | snella | 110 |
| VA 294 | Nestangi | lína | 460 |
| VA 34 | Dunga hans m/b | snella | 302 |
| XV | Palm seafood | botntrol | 57 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 0 | 25 |
| Brosma 2&3 | 107 |
| Hýsa 1 | 336 |
| Hýsa 2 | 802 |
| Hýsa 3 | 1.008 |
| Hýsa 4 | 58 |
| Hvítingur 0 | 320 |
| Longa 1 | 94 |
| Longa 1&2 | 82 |
| Longa 2 | 57 |
| Longa 3 | 20 |
| Longa 4 | 26 |
| Reyðsprøka 0 | 2 |
| Skøta | 33 |
| Skrubba | 17 |
| Toskur 0 | 57 |
| Toskur 1 | 33 |
| Toskur 2 | 454 |
| Toskur 3 | 1.581 |
| Toskur 4 | 1.979 |
| Toskur 5 | 637 |
| Upsi 0 | 299 |
| Upsi 1 | 53 |
| Upsi 2 | 1.303 |
| Upsi 3 | 1.355 |
| Upsi 4 | 1.933 |

# So kom nýtt skip til Vágs



**Fyri nøkrum vikum síðani stevndi Sancy fyri síðstu ferð út eftir Vágsfirði og síðani hevur verið bíðað eftir avloysaranum. Roc Amador kom mánadagin á Vág**

SKIP
*Dagfinn Olsen*

Nú er nakað síðani, at vágbingar seldu Sancy av landinum. Menninir aftanfyri keyptu síðani annað skip, sum síðani hevur verið undir umvæling. Skipið er sett í stand og er í dag rættiliga snotiligt.

Hetta fingu vágbingar at síggja, tá nýggja skipið, Roc Amador, mánadagin stevndi inn eftir Vágsfirði, har stór mannfjøld tók ímóti.

Leingi hava vágbingar bíðað éftir at síggja nýggja skipið. Leingi hevur gingið at seta skipið í stand og bíðað hevur m.a. verið eftir ymsum maskinlutum.

Men mánadagin stevndi stásiliga skipið á Vág og slapp almenningurin umborð at síggja skipið. Lukkuynskini skolaðu yvir eigararnar og manning og tað var ikki smávegis av blómum, ið fóru um bryggjukantin.

Roc Amador fer væntandi til fiskiskap miðskeiðis í vikuni og tá verður so møguleiki at royna nýggju og framkomnu íslendsku ís-skipanina umborð. Nógv hevur verið at hoyrt um hesa ís-skipan hjá íslendingum, sum Roc Amador nú tekur í nýtslu. Sum skilst, verður eisini ein íslendingur við umborð at leggja manningini lag á fyrstu tíðina.

gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Farnir undir nýggja krivjivirkið

**Arbeiðið at byggja nýtt krivjivirki til alifyritøkurnar í Klaksvík er byrjað**

*Nýggja krivjivirkið í Klaksvík fer at kosta einar 30 milliónir krónur at byggja*

BYGGING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Nú er arbeiðið at byggja nýtt krivjivirkið á vestara kaiøki í Klaksvík farið í gongd.

Tað eru alifyritøkurnar Faroe Salmon og East Salmon, sum í felag hava tikið stig til nýggja virkið. Báðar alifyritøkurnar hava stórt virksemi í Norðoyggjum, og tey vilja betra um møguleikarnar og umstøðurnar at taka fisk.

Faroe og East Salmon samstarvað um slaktið av laksinum, og tað ælta tey at halda fram við.

## Seinasta byggiloyvið

Nýggja krivjivirkið kemur at verða góðar 2000 fermetrar til støddar, og tað fer at kosta um 30 milliónir krónur at byggja.

Faroe Salmon hevur ætlanir at økja sína framleiðslu við fleiri túsund tonsum komandi árini, og tí er eisini brúk fyri størri orku til at taka laksin.

Byggiloyvið, sum er latið krivjivirkinum, er tað seinasta av hesum slagi á havnalagnum í Klaksvík. Nú er ikki meiri pláss at byggja á, og hetta er eitt mál, sum hevur fingið nógva viðgerð í Klaksvíkar kommunu.



# Skunda undir yvirtøkuna av løgregluni

**Ferð skal setast á yvirtøkuna av løgregluni. Landsstýrismaðurin heldur, at tað er hugsandi, at løgreglan verður føroysk í hesum valskeiðnum**

*Løgreglan skal verða føroysk í hesum valskeiðnum. Ein nevnd er sett at fyrireika yvirtøkuna*

POLITI
*Eyðun Klakstein*

Landsstýrismaðurin við lógarmálum ætlar, at løgreglan í landinum skal verða føroysk, áðrenn valskeiðið er úti.

– Løgreglan ansar eftir lóg og ordan, og tí er tað sera týdningarmikið fyri eitt og hvørt land at hava sína egnu løgreglu. Vit skulu eisini hava okkara egnu løgreglu, og vit ætla at brúka nógva orku til hesa yvirtøkuna komandi mánaðirnar, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

Ætlanin hjá landsstýrinum hevur verið, at yvirtøkan av løgregluni skuldi verða framd innan 2006, men Høgni Hoydal ætlar ikki at bíða við hesi yvirtøku til seinastu løtu.

Ein nevnd er sett at arbeiða við yvirtøkuni av løgregluni, og í hesi nevnd sita Bergur Berg, sum er formaður, Eyðbjørn Larsen, Súni Vinther, Per Persson, Knud Vammen, Jaspur Vang, Thomas Magnussen og Allan Sørensen.

Nevndin hevur havt sín fyrsta fund, og í gjár var aftur fundur í Tinganesi um yvirtøkuna.



## Arbeiða skjótt

Føroyskir politistar eru ímóti at verða yvirtiknir. Tað vísti ein kanning, sum varð gjørd millum politistarnar í landinum. Men hóast hetta er Føroya Politistafelag við í fyrireikingini av yvirtøkuni.

– Løgreglumenn stúra kanska eitt sindur fyri, at teir verða verri fyri, tá løgreglan er yvirtikin, men tað er ongin orsøk til at stúra fyri tí. Vit skulu hava eina føroyska løgreglu, sum er í allar mátar er á hædd við løgregluna, sum vit hava nú, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

Nevndin, sum er sett at arbeiða við yvirtøkuni av løgregluni, skal koma við einum tilmæli áðrenn 1. november í ár, og í hetta tilmælið skal gera politiska myndugleikan og onnur klókari uppá, hvussu føroyska løgreglan skal skipast.

# All that Rain spæla í høvuðsstaðnum



**Leygarkvøldið fer rockbólkurin, All that Rain, at spæla í Badmintonhøllini í Havn.**

Bólkurin, sum fyri kortum gav út fyrstu fløgu sína, The Naked Truth, hevur spælt nógv seinastu mánaðirnar, og teir hava framvegis nógv at gera.

Nýggja fløga hjá teimum er sera væl móttikin, og sølan hevur gingið væl.

Leygarkvøldið verður tað høvuðsstaðurin, sum sleppur at hoyra All that Rain.

*ek*

# Dúgvan fekk um bógskrúvuna

**Klaksvík:** Seinnapartin í gjár mátti Dúgvan venda aftur stutt eftir, at hon var farin úr Klaksvík.

Orsøkin var, at strandfaraskipið fekk um bógskrúvuna. Forskmaður fór niður at taka av bógskrúvuni, og Dúgvan sigldi aftur sum vanligt frá klokkan fýra.

*ek*